LM-028/2023

LØGTINGIÐ

Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður
Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Mentanarnevndin

2. november 2023

LM-028/2023 hm/ód
(at tilskila í svari)

Í sambandi við viðgerð av **løgtingsmáli nr. 28/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul** (Broyting í javning av stuðulsupphæddum) setir Mentanarnevndin landsstýrismanninum í barna- og útbúgvingarmálum hesar spurningar at svara skrivliga.

Landsstýrismaðurin verður biðin um at upplýsa fyri nevndini, hvussu nógv:

- lestrarstuðulin er javnaður við fyri hvørt árið síðani ár 2000 og fram til í dag, og hvat hetta hevði svarað til í útroknaðum árligum miðaljavningarprosenti fyri tíðarskeiðið

- nýggi javningarleisturin fyri lestrarstuðul, sum er í uppskoti, hevði givið í lestrarstuðulshækkan fyri hvørt árið síðani ár 2000 og fram til í dag, og hvat hetta hevði svarað til í útroknaðum árligum miðaljavningarprosenti fyri tíðarskeiðið

Eisini verður landsstýrismaðurin biðin um eina meting av, hvat nýggi javningarleisturin fer at geva í lestrarstuðulshækkan komandi trý árini samanborið við undir verandi javningarleisti.

Spurningarnir skulu verða svaraðir í seinasta lagi hósdagin 9. november 2023.

Vegna Mentanarnevndina

Hallur Markná
skrivari